# Heilsumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 24. mai 2022
Mál nr.: 21/19789-56
Málsviðgjørt: BL
Ummælistíð:
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/2021: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning om ikraft-træden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á heilsumálsøkinum**
(Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum)

**§ 1**

Í anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. Mars 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 2, § 10, § 23, verður "Indenrigs- og sundhedsministeren kan efter forhandling med Færøernes landsstyre og efter indstilling fra Sundhedsstyrelsen" broytt til: "Landsstýrið kann, eftir tilmæli frá Fólkaheilsustýrinum,".

2. Í § 3, stk. 1, verður aftan á "landslægen" sett: "umboð fyri Fólkaheilsustýrið," og "Føroya Gjaldstova" broytt til: "TAKS".

3. Í § 3, stk. 3, verður "Sundheds-styrelsen" broytt til: "Fólkaheilsustýrið".

4. Í § 4, stk. 2 verður aftan á "de til kommissionen knyttede læger" sett: ", med undtagelse af Landslægen".

5. Í § 4, stk. 3, § 14, stk. 1, § 15, stk. 1 og stk. 3, § 18, stk. 2, 2. pkt. og § 24, verður "Indenrigs- og sundhedsministeren kan efter forhandling med Færøernes landsstyre" broytt til: "Landsstýrið kann".

6. Í § 6, stk. 3 og § 8 verður "Indenrigs- og sundhedsministeren efter forhandling med Færøernes landsstyre og efter indstilling fra Sundhedsstyrelsen" broytt til:

"landsstýrið, eftir tilmæli frá Fólkaheilsustýrinum,".

**7.** Í § 9 og § 12, stk. 4, verður "efter forhandling med Sundhedsstyrelsen" strikað.

**8.** Í § 12, stk. 3 verður "Sundhedsstyrelsen fastsætter efter forhandling med landslægen" broytt til: "Landsstýrið ásetir".

**9.** Í § 13, stk. 2, § 18, stk. 1 og stk. 2, 1. pkt. verður "Indenrigs- og sundhedsministeren fastsætter efter forhandling med Færøernes landsstyre" broytt til: "Landsstýrið ásetir".

**10.** Í § 15, stk. 2 verður "Indenrigs- og sundhedsministeren bestemmer efter forhandling med Færøernes landsstyre," broytt til: "Landsstýrið kann áseta".

**11.** Í § 20 verður "kapitel 43 a i lov for Færøerne af rettens pleje" broytt til: "kapitel 54 i retsplejelov for Færøerne".

**12.** Í § 22, § 25 og § 26 verður "Sundhedsstyrelsen" broytt til: "Landsstýrið".

**13.** Í § 30 verður "lov for Færøerne af rettens plejes" broytt til: "Retsplejelov for Færøernes".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin 1. mai 2023.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Við løgtingsmáli nr. xx/2021: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum) verður hetta málsøkið yvirtikið. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar, sbrt. lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, fáa lóggávuvaldið og útinnandi valdið á omanfyrinevndu málsøki.

Tá ið málsøkið er yvirtikið, stendur verandi lóggáva á økinum við, sbrt. § 5 í yvirtøkulógini, jbr. § 13 í heimastýrislógini við teirri broyting sbr. § 2 í ræðislógini, at har heimildir ella skyldur liggja hjá donskum myndugleikum, verða tær við uppskotinum fluttar til avvarðandi føroyskar myndugleikar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sum er, er lóggávan á farsóttarmálsøkinum anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme.

Í henni liggja heimildir m.a. hjá indenrigs- og sundhedsministeren, Sundhedsstyrelsen, Landslæknanum og landsstýrinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at nágreina, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar, eftir yvirtøkuna.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini (lóg nr. 79 frá 12. mai 2005) og sbr. § 13 í heimastýrislógini (Lov nr. 11 frá 31. mars 1948).

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við hesum lógaruppskotið verður nágreinað, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar, eftir yvirtøkuna.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent til ummælis hjá Landslæknanum, Føroya Landfúta, Ríkisumboðnum og Heilusmálaráðnum.

Úr ummælunum kann nevnast .....

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Tað standast ikki fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum, av tí at broytingarnar eru ein avleiðing av yvirtøkuuppskotinum av farstóttarmálsøkinum.

Fíggjarligu avleiðingarnar av sjálvari farsóttarmálsøkisyvirtøkuni eru lýstar í kap. 2.1. í løgtingsmáli nr. xx/2021: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum)

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Tað standast ikki umsitingarligar avleiðingar av uppskotinum, av tí at broytingarnar eru ein avleiðing av yvirtøkuuppskotinum av farstóttarmálsøkinum.

Fíggjarligu avleiðingarnar av sjálvari farsóttarmálsøkisyvirtøkuni eru lýstar í kap. 2.2. í løgtingsmáli nr. xx/2021: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum).

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, “Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention”. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við “Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap”.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1 nr. 1, § 1, nr. 3-9 og § 1, nr. 11**
Við hesum greinum verða myndugleikaflytingar gjørdar til tilsvarandi føroysku myndugleikarnar.

**Til § 1, nr. 2**
Skotið verður upp, at Landslæknin framhaldandi skal vera limur í Farsóttarnevndini. Hetta av tí, at hann hevur eftirlit við og innlit í alt heilsuverkið í Føroyum. Harumframt verður skotið upp, at umboð fyri Fólkaheilsustýrið verður limur í Farsóttarnevndini. Hetta av tí, at Fólkaheilsustýrið eftir yvirtøkuna skal umsita uppgávurnar, sum Landslæknin higartil hevur loyst sambært farsóttarlógini. Tað vil siga, at umboðið fyri Fólkaheilsustýrið hevur allar uppgávur viðv. farsóttarmálsøkinum í Farsóttarnevndini, ímeðan Landslæknin í Farsóttarnevndini úttalar seg um eftirlit á heilsuøkinum.

Orsøkin til, at Føroya Gjaldstova á sinni skuldi hava fastan nevndarlim í farsóttarnevndini, tá ið farsóttarlógin upprunaliga fekk gildi í Føroyum, var, at hon hevði øll tollviðurskifti um hendi, og harvið øll viðurskifti viðvíkjandi inn- og útflutningi í Føroyum.

Frá 1. mai 1985 varð Gjaldstovan skild sundur í Gjaldstovuna, sum tók sær av roknskaparviðurskiftum landsins, meðan ein nýstovnsett Føroya Tollstova tók sær av tollviðurskiftum. Seinni er hesin stovnur vorðin til TAKS.

At Gjaldstovan ikki longur hevði innflutningsviðurskifti um hendi gjørdi tí, at spurningurin uppstóð um hvørt fasti gjaldstovulimurin í lógini nú skuldi verða Tollstovan, seinni TAKS. Hetta var umrøtt í 1989 (j. nr. 927-11), og á landsstýrisfundi 25. juli 1989 var samtykt at skilja lógina § 3, stk. 1 soleiðis, at Gjaldstovulimurin nú skuldi verða Tollstovulimur. Hesum tóku Gjaldstovan, Tollstovan, útin og Ríkisumboðið undir við í seinni brævaskifti.

Av einihvørji orsøk verður hetta ikki praktiserað soleiðis í dag. Gjaldstovulimurin situr framvegis í nevndini, meðan TAKS stjórin eisini situr í nevndini valdur millum teir landsstýrisvaldu.

Við uppskotinum verður formliga fingið uppá pláss, at stjórin á TAKS er fastur limur í nevndini. Ein nevndarsessur er so tøkur millum teir landsstýrisvaldu afturat. Okkurt sektorøki hevur sett ynski fram um at hava lim í farsóttarnevndini og við broytingini verður tað møguligt.

**Til § 1, nr. 4**
Omanfyri, undir 1, nr. 2, verður skotið upp, at Landslæknin framhaldandi verður limur í Farsóttarnevndini. Tó er ikki ætlanin, at Landslæknin skal verða álagdur uppgávur sambært § 4, stk. 2. Skotið verður tí upp, at seta inn í § 4, stk. 2: "Í § 4, stk. 2 verður aftan á "de til kommissionen knyttede læger" sett: ", med undtagelse af Landslægen".

**Til § 1, nr. 10 og nr. 12**
Føroyar hava fingið nýggja rættargangslóg við lov nr. 964 frá 26. juni 2020 Retsplejelov for Færøerne. Tað sum áður stóð í kapittul 43a er nú flutt yvir í kapittul 54. Tí verður tilvísingin í lógini um smittandi sjúkur broytt. Somuleiðis verður tilvísingin í § 30 til Lov for Færøerne om rettens pleje broytt til: Retsplejelov for Færøerne.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

Heilsumálaráðið, 24. mai 2022

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá ...
Fylgiskjal 2: Ummæli frá ...